# Innbjóðing
## til móttøku



*Eftir at hava starvast hjá Postverki Føroya í 46 ár, hevur Mortan Rasmussen nú valt at fara frá.*

*Í tí sambandi verður boðið til móttøku í kantinuni í bygninginum hjá Postverkinum á Óðinshædd 2*

*fríggjadagin 24. okt. kl. 15.00 - 17.00*

Postverk Føroya

# Móttøka

Jens Jacobsen, yvirportørur, hevur starvast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í umleið 45 ár.

Í sambandi við at Jens nú fer úr starvi, verður móttøka í ÍTRIV á røktarheiminum

**fríggjadagin 24. oktober 2003**
**frá kl. 14.00 til 17.00**

# Fyrilestur um Føroyar á journalistskúla

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Javnaðarflokkur*

Friggjadagin helt formaður Javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaard fyrilestur á norðurlendska journalist háskúlanum í Århus undir heitinum "Føroyar í dag". Hetta er triðja árið, Jóannes er biðin at halda fyrilestur um føroysk viðurskifti fyri journalistum, sum eru komnir á norðurlendska journalist háskúlan á eftirútbúgvingarskeið. Fyrilesturin, sum í mestan mun snýr seg um búskap og politikk uttan tó at verða politiskur, gevur áhoyrarunum eisini eina søguliga gjøgnumgongd frá landnáminum til í dag so áhoyrararnir fáa eina betri fatan av Føroyum, sum einum modernaðum samfelag.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, abbi, beiggi, svágur og verfaðir okkara

**Borgar í Andrasstovu Nybo**

brádliga varð tikin frá okkum og varð jarðaður.

Tøkk til Bjarna Bæk, prest, fyri troystarrík orð í kirkjuni. Takk til berarar, klokkarar, organist, sangarar, gravarar og tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðini.
Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Ásfríð, Hans, Joan, Ásbjørn, Bárður, Annika, Borgfríð, Rannvá, Jóannes, Heðin, Julian og Joan**

---

†

Okkara elskaði maður, babba og verfaðir, abbi og abbilang

**Sverri Djurhuus**
**ættaður úr Kollafirði**

andaðist í heiminum 18. oktober, 83 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 22. oktober kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Ingeborg**

Tey, ið vilja minnast Sverra við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Kollafjarðar kirkju eina gávu, konto í peningastovnunum.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Joensen**
ættað úr Sørvági, búsitandi í Havn

andaðist í heiminum 17. oktober, 93 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju týsdagin 21. oktober kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Eyðna, Nanna og Jóan Einar**





GSM FRÍTÍÐ

| | Teletíð | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3,- min | 2,25 min |
| Samrøður - kvøld | 2,- min | 0,75 min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*íroknað kr. 100,- talutíð

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum





